# Mentamálaráðið

**Mentamálaráðið**

Dagfesting:
20. mai 2019
Mál nr.:
19/00274
Málsviðgjørt: FP/JL

**Uppskot til**

**Kunngerð
um
Førleikastovur**

**(at skipa Førleikastovur í fólkaskúlanum)**

Við heimild í § 24, stk. 4 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum broytt við løgtingslóg nr. 44 frá 30. apríl 2018, verður ásett:

*Virkisøkið*

**§ 1.** Førleikastovur verða skipaðar í fólkaskúlanum at samskipa arbeiðið hjá serlærarum, lesivegleiðarum, orðblindalærarum, AKT-lærarum, støddfrøðivegleiðarum og øðrum starvsfólkum við serútbúgving, sum veita námsfrøðiliga og sernámsfrøðiliga ráðgeving og undirvísing.
*Stk. 2.* Førleikastovan skal:
1) Samskipa námsfrøðiligu og sernámsfrøðiligu førleikarnar og átøkini í skúlanum,
2) menna læruumhvørvið og menningarumhvørvið í skúlanum,
3) miða eftir, at næmingarnir fáa neyðuga hjálp, so tíðliga sum gjørligt,
4) samskipa og gagnnýta servitanina umframt at menna eitt gott læruumhvørvi og námsfrøðilig amboð og mannagongdir og
5) menna eitt næmingalagað og inkluderandi skúlaumhvørvi, har allir næmingar fáa møguleika at mennast og læra, og fáa høvi at vera virknir í felagsskapinum.

*Skipan*

**§ 2.** Førleikastova verður skipað í skúlunum, sum í minsta lagi eru 4 flokkaðir.
*Stk. 2.* Arbeiðið í Førleikastovuni verður skipað undir ábyrgd og í samráð við skúlaleiðaran.
*Stk. 3.* Skúlar, ið eru minni enn 4 flokkaðir, eru knýttir at Førleikastovu í einum størri skúla.
*Stk. 4.* Skúlaleiðslurnar skulu tryggja, at ásetta tænastan frá Førleikastovuni eisini verður veitt skúlum, sum eru knýttir at Førleikastovuni í økinum.

*Stk. 5.* Førleikastovan skal hava hóskandi hølisumstøður og amboð til taks innan arbeiðsøkið.
*Stk. 6.* Førleikastovan skal hava í minsta lagi 8 fastir ráðleggingarfundir um árið.
*Stk. 7.* Leiðarin fyri Førleikastovuna leggur til rættis og innkallar tey, ið manna Førleikastovuna, til føstu ráðleggingarfundirnar. Onnur kunnu luttaka eftir tørvi.

*Starvsfólk*

**§ 3.** Tey, ið manna Førleikastovuna, eru serlærari, lesivegleiðari, støddfrøðivegleiðari, orðblindalærari og AKT-lærari.

**§ 4.** Onnur øki sum skúlavegleiðari, skúlabókavørður, SSP-lærari, KT-vørður, heilsufrøðingur, flokslærari og annars onnur starvsfólk skúlans eru knýtt at Førleikastovuni í mun til ávísu málini, arbeitt verður við og tørvin hjá einstaka neminginum og/ella flokkinum.
*Stk. 2.* Onnur fakøki eiga eftir tørvi at verða knýtt at teimum átøkum, Førleikastovan samskipar og skúlin setur í verk.
*Stk. 3.* Flokslærari og ella flokstoymið verða í øllum málum viðvíkjandi átøkum hjá næmingum og flokkum tikin við upp á ráð.

*Uppgávur*

**§ 5**. Uppgávurnar hjá Førleikastovunum eru at:
1) Menna gott læruumhvørvi og námsfrøðilig amboð og at samskipa og vegleiða,
2) vegleiða og ráðgeva lærarum í fakligum, námsfrøðiligum og sernámsfrøðiligum spurningum,
3) gera yvirlit yvir allar næmingar, sum hava tørv á sernámsfrøðiligari hjálp,
4) skipa og samskipa sernámsfrøðiliga arbeiðið í skúlanum í samstarvi við skúlaleiðaran og Sernám,
5) luttaka í kanningum og útgreinandi virksemi,
6) veita ráðgeving í sambandi við at gera læruætlan fyri einstakar næmingar, sbr. § 2, stk. 6 í kunngerð nr. 127 frá 12. september 2018 um serundirvísing, sernámsfrøðilig átøk og sernámsfrøðiligan stuðul og
7) luttaka í námsfrøðiligum støðuroyndum og eftirmetingum.

*Samstarv við aðrar stovnar*

**§ 6.** Í samráð við leiðslu skúlans samskipar Førleikastovan samstarvið um einstakar næmingar við barnagarðar, aðrar skúlar, Sernám, Almannaverkið, Barnaverd, Psykiatriska Depilin, Gigni, avvarðandi, næmingin o.o.

*Leiðarin*

**§ 7.** Skúlastjórin setur leiðara at leiða og samskipa arbeiðið í Førleikastovuni.
*Stk. 2.* Leiðarin skipar føstu ráðleggingarfundirnar sbrt. § 2, stk. 7.
*Stk. 3.* Leiðarin skal samskipa samstarvið við aðar skúlar og stovnar sbrt. § 6.
*Stk. 4.* Leiðari hevur ábyrgdina av at fylgja við, at avtalur við aðrar skúlar og stovnar sbrt. 6 verða hildnar, og at hetta verður skrásett.
*Stk. 5.* Leiðarin samskipar luttøku skúlans á sernámsfundum við Sernám.

*Serlærari*

**§ 8.** Arbeiðsøkið hjá serlæraranum er at:
1) Veita serundirvísing,
2) samskifta, ráðgeva og vegleiða starvsfólki skúlans og leiðslu í sambandi við sernámsfrøðilig átøk,
3) í samráð við leiðslu skúlans seta í verk og samskipa sernámsfrøðilig átøk og fylgja gongdini,
4) samskifta, ráðgeva og vegleiða um tilfar, hjálpartól o.a. til næmingar, ið hava tørv á hesum í undirvísingini og til próvtøkur og eftirmeting av undirvísingini,
5) vegleiða, samskipa og samskifta við leiðslu og lærarar um próvtøkur eftir serligari fyriskipan og um støðumetingarskjal og

6) fylgja gongdini hjá næmingum, ið eru greinaðir fyri serligan tørv.

*Lesivegleiðari*

**§ 9**. Arbeiðsøkið hjá lesivegleiðaranum er at:

1) ráðgeva og samskipa arbeiði skúlans í sambandi við lesimenning,
2) í samráð við leiðslu skúlans vera við til at orða og menna lesipolitikk skúlans,
3) ráðgeva og vegleiða lærararum at skipa næminglagaða undirvísing í lesing,
4) seta í verk styttri undirvísingarátøk fyri m.a. lesiveik og
5) taka og rætta lesiroyndir í innskúling og miðdeild og vegleiða í sambandi við úrslit av lesiroyndum.

*Støddfrøðivegleiðari*

**§ 10.** Arbeiðsøkið hjá støddfrøðivegleiðaranum er at:

1) ráðgeva og samskipa arbeiði skúlans í støddfrøði,
2) vegleiða leiðslu og starvsfólk skúlans um innihald, háttalag og tilfarsval í støddfrøði,
3) í samráð við leiðslu skúlans vera við til at orða og menna støddfrøðiundirvísing skúlans,
4) fylgja við í eftirmetingum í støddfrøði og vegleiða í sambandi við úrslit í royndum og
5) seta í verk styttri undirvísingar- og menningarátøk í støddfrøði.

*Orðblindalærari*

**§ 11.** Arbeiðsøkið hjá orðblindalærarum er at:

1) undirvísa næmingum við orðblinda trupulleikum,
2) ráðgeva og vegleiða næmingum, foreldrum, lærarum og leiðslu í sambandi við orðblindni,
3) gera yvirlitiskanningar og einstaklingakanningar av næmingum í 3. flokki,
4) vegleiða námsfrøðiliga viðvíkjandi CD orð og øðrum tøkniligum forritum og
5) útvega tilfar, fyrireika og førleikamenna øki.

*Akt-lærari*

**§ 12.** Arbeiðsøkið hjá AKT-lærarum er at:

1) tosa við flokkar um trivnað, skipa fyri tiltøkum at fremja trivnað og fyribyrgja happing í samráð og samstarvi við flokslærarar og flokstoymið,
2) eygleiða, hvussu samskift verður og veita vegleiðing í hesum sambandi,
3) vegleiðing og hjálp viðvíkjandi næmingasamrøðum, floksfundum og foreldrafundum,
4) samrøða við einstakar næmingar, bólkar og foreldur og
5) gera AKT-virkisætlan saman við lærarum fyri einstakan næming/flokk við støði í eygleiðing og samrøðum.

**Gildiskoma**

**§ 13.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Mentamálaráðið, xx. mai 2019

**Hanna Jensen**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen